## Brævaskifti út í bók

»Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoyda« er heitið á heilt sermerktari útgávu hjá forlagnum Fróðskapur, sum júst er komin í bókabúðirnar. Talan er um onki minni enn brævaskifti, sum teir tríggir rithøvundarnir Chr. Matras, William Heinesen og Kartsten Hoydal høvdu í tíðarskeiðnum frá endanum á fyrra heimsbardaga til nakað eftir seinna heimsbardaga. Bókin gevur ein sjádsaman møguleika at fáa innlit í ikki minst føroyskt bókmentaligt virksemi í hesum tíðarskeiðnum. Øll brøvini eru givin út við loyvi frá familjuni hjá brævaskrivarunum. Tað er Anne-Kari Skarðhamar, sum skrivaði Ph.D.ritgerð um partar av ritverkinum hjá Christiani Matras, sum hevur fingið skrivað brøvini av, viðmerkt og annars lagt útgávuna til rættis.



## Vantandi hagtøl um ættleiðing

Ættleiðingarfelagið hevur heitt á Ríkisumboðið, um at fáa til vega álítandi hagtøl yvir ættleiðing í Føroyum . Hagtøl um ættleiðing hava stóran áhuga millum fólk og fær Ættleiðingarfelagið fleiri spurningar hesum viðvíkjandi. Fólk vilja vita, hvussu nógv børn verða ættleidd árliga, hvussu býtið er millum londini, hvussu nógv eru ættleidd til Føroya tey síðstu 10 árini og so framvegis. Á heimasíðundi hjá kærunevndini í ættleiðingarmálum, www.adopt.dk, eru hagtølini fyri Danmark bæði lætt og greitt atkomulig. Í Føroyum varir Ríkisumboðsmaðurin av málsøkinum ættleiðing og hevur stovnurin atgongd til tøl í sambandi við ættleiðing.

# Vóru ov illa plaserað



*Fólk frá Fólkaheilsuráðnum býttu út hítir á festivalinum. Men avsetningurin var ikki eins góður og til G! og Sumamrfestivalin í fjør*

*Mynd: Durita Müller Thomsen*

**Básurin, vit fingu, lá illa fyri í gyklalandinum og ikki á einari náttúrligari leið hjá teimum ungu. Tað var helst orsøkin til, at vit ikki býttu út meiri enn helvtina av hítum í mun til aðrar festivalar, sigur Malan Egholm frá Fólkaheilsuráðnum**

VIÐ MÚRIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólkaheilsuráðið hevr verið fastur fúsur á teimum seinastu festivalunum, har tey upplýsa teimum ungu um sex og rúsevni. Eisini hava tey býtt út ókeypis hítir á festivalunum, og tað hava tey ungu tikið væl ímóti.

- Básurin, vit fingu, var plaseraður í gyklaralandinum heilt niðri við sjógvin, og tað var ikki ein leið, sum tey ungu náttúrliga løgdu framvið. Og tað eru vit eitt sindur hørm um, tí eftir øllum at døma bar ikki til at flyta básin, sigur Malan Egholm frá Fólkaheilsuráðnum.

Tey valdu tí at fara út at ganga á sjálvum festivaløkinum fyri at hitta tey ungu, og tað riggaði rímiliga væl.

- Men vit býttu bara út eitt stað millum 2000 og 2500 hítir, og tað er bara umleið ein helvt av tí, vit býttu út á G!-Festivalinum og Summarfestivalinum í fjør, sigur Malan Egholm.

Økið var ógvuliga stórt, og hartil gjørdist veðrið vánaligt leygarkvøldið, og tað hevur kanska heldur ikki bøtt um at býta út hítir á økinum.

### Lítið upplýst

Í sambandi við festivalin hevði Fólkaheilsuráðið gjørt eitt spurnarblað, sum varð deilt út á økinum, har ungfólk kundu svara seks spurningum um Klamydia.

- Lutakast fór so fram millum tey, sum høvdu svarað øllum spurningunum rætt, um talutíðarkort frá Vodafone og Føroya Tele, og tað tókst at vera populert millum ungfólk, sigur Malan Egholm.

Men hon sigur samstundis, at vitanin millum ungfólk um kynssjúkur er ógvuliga avmarkað.

- Tað tykist, sum nýta tey ungu hít bara við tí endamáli, ikki at gerast við barn. At nýta hít fyri at verja seg móti kynssjúkum kemur í lítlan mun teimum ungu til hugs, sigur Malan Egholm.

### Skúlarnir svíkja

Malan Egholm heldur, at tað verður nýtt ógvuliga lítil tíð upp á sexualundirvísing í skúlunum. Og hartil verður fokuserað í alt ov stóran mun upp á at gerast upp á vegin ella ikki.

- Tað verður tosað alt ov lítið um kynssjúkur og um kenslur. Yvirhøvur verður nýtt alt ov lítil tíð upp á hetta í skúlunum, sigur Malan Egholm.

# Samarittarnir úr at gera

**- Vit høvdu 137 viðgerðir hesar dagarnar, og tað er alt frá plástri til tað heilt akutta, sigur Steinbjørn Olsen, leiðari fyri samarittarnar, sum vóru við Múrin**

VIÐ MÚRIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hetta er fystu ferð, at vit hava havt so langa vakt. Vit byrjaðu mikudagin klokkan 15 og góvust ikki fyrr enn sunnumorgunin klokkan 06, sigur Steinbjørn Olsen, sum var leiðari fyri samarittarnar á festivalinum við Múrin.



*Samarittarnir høvdu úr at gera á festivalinum við Múrin*

*Mynd: Durita Müller Thomsen*

Átta ferðir máttu teir geva ilt og átta ferðir máttu teir senda boð eftir sjúkrabilinum.

- Í fýra førum var talan um heilt akutta viðgerð, og vit vóru til reiðar við hjartastartaranum, sigur Steinbjørn Olsen.

Allar viðgerðir verða skrásettar, og tilsamans góvu samarittarnir 137 viðgerðir á festivalinum.

- Hetta er sjálvandi eitt stórt tal, men vit skulu eisini minnast til, at vit byrjaðu mikudagin, so tað hevur eisini verið yvir eina langa tíð, sigur Steinbjørn Olsen.

Nógv fólk hava verið til avrúsingar hjá samarittunnum, og í fleiri førum hava tey verið noydd at fingið hita aftur í fólk, sum eru dottin av.

- Hetta var serliga galdandi tá veðrið gjørdist so vánaligt, sigur Steinbjørn Olsen.

### Væl fyrireikað

Tey hava verið nógv til arbeiðis hesar dagarnar.

- Vit vóru 24 fólk til arbeiðis, tá vaktin var størst. Vit eru 32 útbúnir samarittar og umframt tað hava eisini aspirantar hjálpt til, sigur Steinbjørn Olsen.

Fólk, sum ynskja at gerast samarittar, skulu verða aspirantar í eitt ár, áðrenn tey sleppa at læra til samaritt.

- Vit hava fyrireika okkum ógvuliga væl. Og samstarvið við sjúkrabilatænastuna og løgregluna hevur